Búskapar- og løgfrøðingar:

## Stovnsetið føroyskan arbeiðsmarknaðarrætt skjótast tilber

ARBEIÐSMARKNAÐUR

Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya samtykti á limafundi hóskvøldið einmælt ikki at fara í verfall at mótmæla nýtslu av fútarætti í ósemjum á føroyska arbeiðsmarknaðinum.

**Búskapar- og Løgfrøðingafelagið staðfestir, at:**
- Fútarætturin ikki er best egnaða amboðið til at loysa ósemjur á arbeiðsmarknaðinum, og eigur bert at verða nýttur um allar aðrar royndir at finna semju eru miseydnaðar

- Fútarætturin fer at verða nýttur sum eitt slag av arbeiðsmarknaðarrætti í Føroyum, so leingi sum ongin føroyskur arbeiðsmarknaðarrættur er stovnaður

- Fútarætturin er ein partur av rættarskipan okkara, og má hesin rættur virðast

**BLF mælir til, at:**
- Føroyar fáa ein skipaðan arbeiðsmarknað skjótast tilber.

Partarnir á arbeiðsmarknaðinum skjótast møguligt semjast um at seta á stovn ein føroyskan arbeiðsmarknaðarrætt, ið skjótt og greitt kann taka avgerðir í føroyskum arbeiðsmarknaðarmálum í framtíðini.

**el**

# Ein flokkur, eitt hugskot, eitt blað

**Ein 6. flokkur í Nonnuskúlanum í Havn hevur gjørt tað, sum vit í einum Miðlahúsi gera hvønn dag: Tey hava framleitt eina avís**



6.A í Nonnuskúlanum hevur framleitt sína egnu avís

Mynd: Jens Kr. Vang

Tey vóru øll áhugað í at gera eitt blað. Og sum ætlað, so gjørt.

Tey settu eina viku av til blaðarbeiðið, og skipaðu seg soleiðis sum ein ger á einumhvørjum blaði: Ein var blaðstjóri, nøkur skrivaðu og nøkur útvegaðu lýsingar, meðan onnur gjørdu layoutið.

Endaliga úrslitið gjørdist blaðið "Minutt og sekund 0.1", sum tey nú selja á gøtuni og aðrarstaðir har fólk savnast.

Blaðið hevur 16 síður við litum, og ein skal ikki hava lisið leingi í blaðnum fyrrenn ein greitt sær, at næmingarnir hava lagt bæði lív og sál í arbeiðið.

Íalt eru prentað 2000 eintøk, og tey vænta at sleppa við øll. Yvirskotið av søluni fer til eina námsferð, tey ætla at gera seinni.

**sb.**

# Makrel á Jóansøkufestivali

**Nú sæst so smátt ein byrjan til skránna fyri ætlaða jóansøkufestivalin. Skotbráðið er stutt og nógv er tengt at stuðlinum, sum kommunur og onnur lata tiltakinum, men fyrireikararnir hava góðar vónir um at tað eydnast at stápla eitt virðiligt aftursvar uppá beinini, nú sandoyingar ætla at skipa festival á jóansøku**



FESTIVALUR

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Eitt av nøvnunum, sum hevur játtað at vera við á jóansøkufestivalinum, sum verður á Tvøroyri í ár, er Makrel.

Bólkurin gjørdist rættiliga væl umtóktur eftir luttøkuna í Prix Føroyum og er við á 15 teim bestu í ÚF.

Umframt Makrel er greitt, at fleiri av fremstu føroysku troubadururnum vísa jóansøkufestivalinum áhuga, samstundis sum arbeitt verður við at fáa til vega útlendska luttøku.

**Bjarga jóansøkuni**

Fyrireikararnir leggja dent á, at tiltakið er ikki bert í ár og ikki bert á Tvøroyri, men eitt jóansøkutiltak, sum er galdandi fyri Tvøroyri og Vág og alla oynna annars. Tiltakið skal gerast afturvendandi.

- Tiltakið er í veruleikanum ein roynd at bjarga jóansøkuni, nú onnur tykjast áhuga í at leggja tiltak um somu tíð aðrastaðni í landinum og sostatt fara avstað við jóansøkuni. Eydnast tað at skapa siðvenu við nýggja tiltakinum, so kann jóansøkan pakka saman. Tí vóna vit, at kommunurnar - allar sum ein - taka undir við ætlanini, tí uttan stuðul verður neyvan nakar jóansøkufestivalur, sigur fyrireikingarbólkurin, sum hevur limir úr Vági og av Tvøroyri.

Enn vilja teir ikki út við, hvørji útlendsk nøvn teir hava í huga, men arbeitt verður hart fyri at fáa okkurt útlendskt navn hendavegin, skilst.

# Kórkonsert í Kirkjubøar kirkju

**Kórið Gøta-Leirvík (úr Gøtu og Leirvík) og kórið Sólarmagn, (Kirkjubø og Velbastað), fara at hava várkonsert í Kirkjubøar kirkju leygardagin 14. mai klokkan 17**

KONSERT

Nakað av tilfarinum, kórini fara at syngja, er kirkjuligt. Men størri parturin av konsertini verður helst av øðrum heimspekiligum og verðsligum slagi. Sungið verður um kærleika. Væleydnaðan, ella....? Sungið verður um náttúruna, nú friður er við at koma yvir árstíðina. Og sungið verður um innilig viðurskifti, sum verd eru at geva gætur.

Væntandi ein hugnalig løta í vøkru, ljósu og vælljómandi Ólavskirkjuni.

Tað er Martin Mouritsen, sum stjórnar kórinum Gøta-Leirvík og Fróði Sandoy, sum stjórnar kórinum Sólarmagn.

Konsertin fer at vara umleið ein tíma

Internet Sosialur in
www.sosialurin.fo